


*Una Poulsen til reiðar at leggja frá landi við Mandy on holiday, sum er eitt nýbrot í føroyskari bókaútgávu*

# Enskt í fjórða

TEKSTUR OG MYND: BIRGIR KRUSE

**Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur gjørt av, at í samsvari við altjóðagerðina skulu føroysk børn læra enskt longu í 4. flokki. Samsvarandi hesum krøvum hevur Una Poulsen fyri Føroya Skúlabókagrunn gjørt nýggja enska lærubók**

Hin 1. august varð fólkaskúlalógin broytt, soleiðis at frálæra í enskum nú byrjar í fjórða flokki. Tað var landsstýrismaðurin í mentamálum, sum í almennari fráboðan hin 12. januar 2005 tók fyrsta stig til hesa lógarbroyting, ið er ein staðfesting av nógva tosinum um altjóðagerð.

Við skúlaársbyrjan lá tí nýggj bók Mandy on holiday á borðinum hjá fjórða flokki.

- Umframt at lofta ásetingum landsstýrismansins um altjóðagerð og geva eitt ítøkiligt dømi um okkara lut í hesum víðfevnda setningi, er bókin eitt nýbrot í føroyskari skúlabókasøgu, sigur Helena Dam á Neystabø, sum er leiðari á Føroya Skúlabókagrunni.

## Heimrustin og altjóðagerð

Í bókini um Mandy kunnu heimsins børn á fyrsta sinni lesa um útróður og fjallgongu í eini lærubók í enskum, sum eftir einum ári er gjørd í Føroyum. Útgevari er Føroya Skúlabókagrunnur, og rithøvundur er Una Poulsen, sum í 35 ár hevur undirvíst í enskum og áður hevur gjørt tvær bøkur í somu lærugrein.

Farna skúlaár fekk Una farloyvi at skriva enskt lærubókatilfar, nú lógarbroyting varð framd, so føroysk børn skulu læra enskt eitt ár fyrr.

- Setningurin fevnir um tvær bøkur. Henda, sum tekur støði í føroyskum viðurskiftum, og hin seinna, ið tekur støði í enskum viðurskiftum og kemur næsta ár, so hon er klár at brúka í fimta flokki.

- Sum lærari í enskum havi eg saknað føroyskar undirvísingarmiðlar, ið menna førleikan hjá næmingunum at málbera seg á enskum um heimlig viðurskifti, tí tað er grundleggjandi í allari námsfrøði, sigur Una Poulsen og heldur, at vit í byrjanarundirvísingini eiga at seta okkara egna frámerki á tilfarið, so børnini í fjórða flokki læra um heimstaðin og gerandisdagin, og hvussu tey við støði í hesum kunnu málbera seg á fyrsta stóra fremmandamálinum. Tá tey so koma í fimta flokk, er spennandi at fara út í verð og læra um ensk og onnur fremmand viðurskifti.

So statt stuðlar Una við hesi bók upp undir orðini hjá skaldinum Heðini Brú, tá ið hann í vígslukantatu Læraraskúlans sigur soleiðis um næmingin: "Gev honum bert trygt at standa á / og sláið so gluggarnar frá!"

## Mandy og Peter vitja

Bøkurnar báðar bera navnið á ensku gentuni Mandy, ið hevur slekt í Føroyum. Í fyrru bókini Mandy on holiday er hon á ferð í Føroyum, meðan hon í seinnu bókini Mandy at home er heima í Bretlandi, har føroyska systkinabarnið Peter kemur á vitjan.

Bøkurnar lata soleiðis upp fyri, at føroysku næmingarnir umframt fakligu undirvísingina eisini kunnu taka upp persónligt samstarv við javnaldrandi næmingar.

- Til dømis í enska býnum Poulton, har Davia Walmsley býr og rekur listarligu glarsmiðjuna Daedalian Glass. Hon er langabbadóttir Jørgin Davidsen av Nesi, so umframt at vit báðar eru trímenningar, hevur Davia verið mær ein góður stuðul, sigur Una, sum nú fer til Bretlands at vitja og finna tilfar til næstu bókina, har bretska Mandy býr.

Tá fáa føroysk børn í fimta flokki innlit í, hvussu ensk børn á sama aldri liva.

- Dentur verður lagdur á at fáa ensku mentanina við, og tá ið okkara næmingar hava verið ígjøgnum báðar Mandybøkurnar, skuldu teir verið væl førir fyri at farið í útlendskar lærubøkur, ið hóska til teirra aldur, sigur Una.

## Lógarbroytingin

Tað var við ársbyrjan í fjør, at Mentamálaráðið í tíðindaskrivi boðaði frá, at Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, vildi fremja broytingar í fólkaskúlalógini at galda frá 1. august 2006. Ein av trimum broytingum galt undirvísingina í enskum, sum landstýrismaðurin vildi flyta heilt niður í 3. flokk.

Grundgevingin var, at enska málið er ein týdningarmikil samskiftislykil í alheimsgerðini. Harafturat eru flestu børn kunnug við enskt mál, longu áðrenn tey fara í skúla. Tað kann tí tykjast nakað rangvørgt, at tey ikki fáa undirvísing í enskum, fyrr enn tey eru komin í 5. flokk, segði Mentamálaráðið í tíðindaskrivi 12. januar 2005 og tók samanum við hesum orðum: "Sum er, byrja næmingarnir at læra danskt í 3. flokki. Hildið verður ikki, at tað fer at ørkymla frálæruna í donskum ella føroyskum, um byrjað verður við enskum í 3. flokki við 1 undirvísingartíma um vikuna. Ætlanin er at hava 2 undirvísingartímar um vikuna í 4. flokki."

Hetta uppskot vann tó ikki frama, og semja varð um at byrja við enskum í 4. flokki frá og við hesum skúlaári, sum byrjaði hin 14. august, tá nýggja bókin Mandy on holiday á fyrsta sinni lá á føroyskum skúlaborðum.

Umframt bókina fevnir røðin um Mandy eisini um fløgu við upplestri av øllum teksti, sum er í bókini, tónleikafløgu við 24 sangum, sum børn og vaksin syngja undir leiðslu av Paula Hansen, lærarabók við frágreiðingum um, hvussu bókin kann brúkast í undirvísingini og eina umfatandi avritsmappu, har vit m.a. finna Island Travelling, sum er eitt borðspæl, har næmingarnir læra um bretsku oyggjarnar.

Lærarabók og avritssíður kunnu ókeypis takast niður av heimasíðu grunsins www.fsg.fo, har brúkarar eisini kunnu gera viðmerkingar til nýggja tilfarið. Dagføringar og ískoyti fara at verða gjørd, bæði til læraran og næmingin, til tess at gera frálæruna í enskum livandi, stuttliga og fjølbroytta, nú hon byrjar longu í fjórða flokki.